gult cyan magenta svart



Suðuroyingar púra samdir:

# Nýggi Smyril skal sigla 21 míl

**Tað er ongin sparing í at gera eftir tilmælinum hjá Bjarna Djurholm og at byggja eitt skip, sum er minni og siglur seinni**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

Tað nýggja skipið, sum ætlanin er at byggja til suðuroyðarsiglingina, má og skal sigla 21 míl.

Tað eru suðuroyingar samdir um.

Í hesum málinum standa teir øksl við øksl í kravi sínum til landsins myndurgleikar.

Landsstýrið hevur ikki enn tikið støðu til, hvussu tann nýggi Smyril skal síggja út.

Men nevndin hjá Strandferðsluni, sum hevur fyrireikað bygginginga, hevur mælt Vinnumálastýrinum til at byggja eitt skip, sum siglur 21 míl.

Við í nevndini sótu eisini umboð fyri vinnuna og kommunurnar í Suðuroynni.

Hetta er eitt skip, sum er einar 120-130 metrar langt og kostar 305 milliónir at byggja.

Tó hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum mælt til at byggja eitt skip, sum bara gongur 19 míl. Hetta skipið er einar 115 metrar langt og kostar 275 milliónir.

– Men hetta góðtaka suðuroyingar ikki, teir vilja hava eitt skip, sum siglur 21 míl- og onki annað.

Suðuroyingar vísa á, at tann Smyrilin sum er, kann sigla 19 míl, um koyrt verður á motorarnar og tí er skipið, sum Bjarni Djurholm mælir til, als onki framstig.

## Onki bíligari

Frá keldum, sum kenna málið, hava vit fingið at vita, at tað er púra ongin sparing í at byggja skipið, sum Bjarni Djurholm hevur mælt til.

– Skipið, sum fyrireikingarnevndin hevur mælt til, og sum siglur 21 míl, gongur við tungolju, sum er væl bíligari enn vanliga oljan. Tí er skipið nógv bíligari í rakstri.

Tað frættist somuleiðis, at avtala er gjørd við SEV um at at fáa tungolju.

Hetta skipið er eisini longu teknað. Harafturat hevur kenda danska felagið Knud E. Hansen, sum projekterar skipið, víst á, at í Kina kann hetta skipið byggjast fyri 255 milliónir. Tá er íroknað, at tveir mans frá Knud E. Hansen eru á skipasmiðjuni í allari byggitíðini og hava eftirlitið við byggingini.

– Tí er tað ongin sparing í at taka av tilmælinum hjá Bjarna Djurholm, tí tað skipið kostar, sum nevnt 275 milliónir.

– Men tað er ikki teknað enn, so har skal ein eykakostnaður roknast. Tað gongur heldur ikki við tungolju og tí verður tað væl dýrari í rakstri.

– Alt í alt er púra ongin sparing í at fylgja tilmælinum hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, serliga, tá ið vit hugsa um, at talan er um eina íløgu, sum skal halda í 30 ár.

## Brúgvin til meginøkið

Ein av teimum, sum hevur verið í nevndini, sum hevur fyrireikað skipið, er Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági.

Beint nú vil hann ikki gera so nógvar viðmerkingar til smálutir í málinum .

– Men tað er ikki nakað dulsmál longur, at vit hava mælt til eitt skip, sum siglur 21 míl.

– Vit halda, at eitt slíkt skip er heilt neyðugt fyri at fáa Suðuroynna á Føroyakortið, sigur hann.

– Tað, sum hevur størstan týdning fyri okkum, er, at vit fáa eitt skip, sum siglur so skjótt, at tað veruliga knýtur Suðuroynna upp í meginøkið.

Við hesum skipinum ber tað eisini til at fáa fleiri túrar, um tað verður neyðugt.

Jógvan Krosslá sigur, at við skipinum, sum siglur 21 míl, ber til at fara úr Suðuroy klokkan 6.30 um morgnarnar og vera í Havn kl. 8. Sostatt sleppa allir suðuroyingar við flogfarinum. Skipið kann fara suðuraftur á miðdegi og vera í Suðuroy kl. 13.30. Tað gevur eisini Suðuroyingum fýra tímar í Havn til fundir ella til onnur ørindi, hóast teir eru heima aftur í hampiligari tíð. Skipið kann so fara norðuraftur kl. 17. Sostatt fáa norðoyingar eisini meiri enn tríggjar tímar í Suðuroy til at gera síni ørindi.

At enda kann skipið so sigla suðuraftur kl. 19. Sostatt sleppa allir suðuroyingar, sum koma við flogfarinum heim um kvøldið.

## Eitt væla skip

Jógvan Krosslá sigur, at hetta skipið, sum nevndin hevur mælt til at byggja, er í allar mátar eitt væla skip.

– Tað hevur sama snið sum verjuskipið Triton, ið er eitt tiltikið gott sjóskip. Somuleiðis er skipið sera væl útgjørt.

Hann heldur ikki, at 300 milliónir er ov nógv at brúka upp á eitt suðuroyarskip.

– Tað er ikki meiri enn ætlanin er at brúka upp á undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð.

Hetta skipið verður okkara brúgv til meginøkið og tað má verða eitt krav, at tað lúkar tey krøv, sum suðuroyingar seta til eitt slíkt skip.

Hann vísir eisini á, at í fyrstuni, tá ið nýtt suðuroyarskip kom upp á tal, varð tosað um eina tvíkilju, sum kostaði út ímóti einari milliard. Men nú er ætlanin so enda niðri á einum vanligum skipið fyri 300 milliónir.

Δ





**Ert tú tann rætti ... ?**

Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persónligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar eru vælkomnir at søkja.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2001 kl. 16.

FØROYA SPARIKASSI

Starvsfólkadeildin Yviri við Strond 2 100 Tórshavn Tel 348 000 Fax 348 453
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikassin.fo www.sparikassin.fo




# Handilskjarnin umbygdur

**Umfatandi broytingar eru framdar í Handilskjarnanum, nú umbyggingin er liðug. Handilin er nú býttur upp í eina damudeild og eina harradeild**

UMBYGGING
*Stefan í Skorini*

Tey hava arbeitt bæði dag og nátt niðri í Handilskjarnanum seinastu vikurnar, og nú er endiliga komið á mál.

Mest merkisverda broytingin er, at handilin nú hevur eina damudeild og eina harradeild. Fyrr var hetta undir einari deild. Skódeildin er samstundis avtikin, men tey halda fram við at selja skógvar. Harraskógvar fáast í harradeildini, meðan damurnar kunnu keypa sínar skógvar ídamudeildini. Damudeildin er á aðru hædd, og harradeildin er á triðju hædd.

Handilskjarnin hevur sostatt fingið tveir nýggjar handlar, meðan tveir aðrir eru avtiknir.

Umframt tað at handlarnir eru umskipaðir, so er gólvið, ljósið og innbúgvið skift út og nýtt er fingið ístaðin. Eisini er nýggj kassaskipan, sum bindur allar handlarnar, bæði teir í Handilskjarnanum og í SMS, saman í eitt kervi.

– Tíðin var komin til, at vit framdu nakrar broytingar í handlinum. Tað er týdningarmikið at fylgja við í menningini, tí hon steðgar ikki, fyri tað um vit steðga upp, sigur Schumann Hjaltalin, stjóri í Handilskjarnanum.

Handilskjarnin fekk í hesum sambandi nakrar serfrøðingar á økinum at leggja hesar umbyggingarnar til rættis, so at úrslitið skuldi verið av tí frægasta.

Í sambandi við umbyggingina hevur Handilskjarnin meldað seg í donsku handilsketuna Tøjeksperten, sum ikki hevur verið í Føroyum seinastu tíggju árini. Hetta var ikki møguligt áðrenn umbyggingina, tí handilin hevði ikki uppfylt tær treytir, ið settar verða teimum, sum vilja við í handilsketuna.

Nú hevur handilin so fingið grøna stemplið, og tað fegnast eigararnir stórliga um. Teir siga, at teir nú leggja seg meira eftir at hava klæði í øllum støddum fyri at fáa ein breiðan kundaskara.

Tað hevur tikið handverkarum seks vikur at fremja umbyggingina, og handilin var stongdur í eina viku, áðrenn hann lat uppaftur í nýggjum hami.

– Tá handilin er stongdur í eina viku, so eru fólk spent eftir at síggja, hvat er komið burturúr, og tí hava vit havt nógv viðskiftafólk hesar seinastu dagarnar, sigur Schumann Hjaltalin.



*2. og 3. hædd hava verið stongdar í eina viku, men er nú latin uppaftur í nýggjum hami. Handlarnir eru umskipaðir, so at tað nú er ein harradeild og ein damudeild*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gospelbrak í Runavík



*Fremsti gospelbólkurin í landinum, I Am, spælir á konsert í Runavík leygarkvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Stór gospelkonsert verður í Runavík leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið verður stór gospelkonsert í ítróttarhøllini í Runavík.

Á konsertini fara bólkarnir I Am og MMM at spæla, umframt at kórið Vox eisini verður við

I Am er helst fremsti gospelbólkurin í landinum júst nú. Bólkurin er við í Prix Føroyar tónleikakappingini, og hann vann innleiðandi umfarið, sum var á Strondum. 21. apríl fer bólkurin at kappast við sjey aðrar bólkar í stóru Prixfinaluni.

I Am gav ein vælumtókta fløgu út í fjør, og sangurin Willy vs. Jesus hevur seinastu vikurnar ligið ovast á føroyska PopTop listanum hjá Útvarpinum.

## Eisini kór

Bólkurin MMM hevur eisini roynt seg í Prix Føroyar kappingini í ár. Bólkurin er úr Vágum, og royndi seg eisini í innleiðandi umfarinum har.

Hóast framførslan var góð, náddi bólkurin ikki víðari til finaluna.

Gospelkórið Vox er mannað við ungum sangarum úr Eysturoynni. Talan er um eitt rútmiskt kór, sum hevur tónleikarar at spæla undir.

Konsertin verður leygarkvøldið klokkan 22.30. Atgongumerki kunnu keypast við dyrnar.

## Rætting

Í mikudagsblaðnum varð greitt frá Dick Hentze, ið var komin til Føroya at leita eftir skyldfólki. Tá var skrivað, at abbabeiggi hansara, Búe, ongantíð var aftur í Føroyum. Hetta er komið skeivt fyri, tí Búe var tvær ferðir í Føroyum. Hesar ferðirnar gjørdi Búe í 60-unum. Vit takka lesaranum, ið gjørdi vart við mistakið